# Seinasti skósmiðurin

**Skósmiðurin í Miðvági heldur, at fólk eru ov líkasæl og vanda sær ov lítið um, hvat tey tveita burtur. Tað er ov lítið at gera hjá skósmiðinum i dag, tí fólk vita ikki um hann ella tíma ikki at brúka hann. Tað er lættari at blaka burtur og keypa nýtt**

HANDVERK
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Skósmiðjan stendur klár við allari útgerð. Skósmiðurin bíðar eftir kundunum, sum ikki koma. Fólk blaka heldur góðar skógvar burtur og keypa nýggjar enn at fara at leggja upp undir einar heilt væl nýtiligar skógvar.

– Fólk eru alt ov líkasæl, sigur Jóhannus Fr. Hansen, skósmiður í Miðvági. Tey blaka burtur skógvar, sum fyri sera lítlan penga kundu verðið sum nýggir aftur, um tey tímdu at fara til skósmiðin við teimum.

Okkara brúkaramentan er vorðin soleiðis, at tað tykist bara vera tann lættasta loysnin, sum vald verður. Brúka einaferð og blaka so burtur. Skógvar, sum kosta nógvar pengar, verða brúktir, til slit sæst á, ella kanska eitt hol er, og so verður blakað burtur, og nýtt keypt. Hóast hann saktans kann fáa einar heilt góðar skógvar burtur úr aftur við at leggja undir teir fyri lítlan penga, sigur skósmiðurin.

## Doyggjandi fólkaslag

Skósmiðirnir í Føroyum eru eitt útdoyggjandi fólkaslag, staðgfestir Jóhannus Hansen.

Hann minnist, at tá hann lærdi til skósmið hjá Olla í Lágabø í Vági í fimtiárunum, vóru eini fimm-seks skósmiðir bara í Vági, og teir høvdu nokk at gera.

Í dag er eingin i Suðuroynni, sigur hann. Ein byrjaði herfyri, men gavst skjótt aftur, tí ov lítið var at gera.

Sama lagið er í Vágum. Fólkagrundarlagið er kanska í minna lagi. Í hvussu er við tí hugsunarhátti, sum fólk hava í dag.

Men hinvegin hevði tað borið væl til, ivast hann ikki i, um fólk bara hugsaði øðrvísi og brúkti meira aftur av slíkum, sum brúkast kann.

So soleiðis sum støðan er í dag, verður einki arbeiði av týdningi gjørt í skósmiðjuni, og skósmiðurin er farin til skips. Hann er kokkur í oljuvinnuni. Siglir við einum vaktarskipi í Norðsjónum.

– Men eingin ivi er um, at eg vildi heldur verið her og arbeitt við tí, eg havi lært til, sigur Jóhannus Fr. Hansen, skósmiður i Miðvági.



*Tað hevði væl borið til at livað av at verið skósmiður í Føroyum, um hugsunarhátturin hjá fólki var øðrvísi, sigur Jóhannus Fr. Hansen, skósmiður í Miðvági*

*Mynd: Edvard Joensen*

## Fasta sambandið

Sum vágafólk yvirhøvur hevur skósmiðurin stórar vónir til fasta sambandið undir Vestmannasundi.

Hann metir, at tað fer at gera tað møguligt at arbeiða aðrastaðni enn bara í Miðvági. Til dømis hevði hann einki havt í móti at arbeitt avísa tíð eitt nú í Havn, sigur hann.

Hann hevur áður, í styttri tíðarskeiðum, arbeitt í Havn, og metir hann, at tørvurin á einum skósmiði í høvuðstaðnum er so mikið stórur, at tað saktans átti at borið til.

Hinvegin var tað ferðingin, sum gjørdi, at hann helt tað vera í so møtimikið. Men tá fasta sambandið er komið, ber væl til at samskipa tað onkusvegna við at vera í Havn viðhvørt og annars hava stød í Miðvági, har øll útgerðin stendur.

## Verkstaðið

Jóhannus Hansen hevur væl útgjørda skósmiðju á Heiðatrøðni í Miðvági. Alt er inni, sum neyðugt er hjá einum skósmiði at hava. Maskinur til at skera og seyma við. At víðka skógvar og at pussa og slípa tilfarið, eins og trygdarútgerðin eisini er í lagi. Góð útsúgving er, sum altið syrgir fyri at taka límlukt og annað skaðiligt burtur.

– Eg arbeiði ongantíð, uttan útluftingin er tendrað, greiðir Jóhannus frá, og tekur í sama viðfangi eina masku, sum liggur á borðinum við síðuna av. Hesa havi eg altíð, og eisini havi eg eina ordiliga, sigur hann og peikar á eina rættiliga gassmasku.

Maskinurnar eru komnar ymsastaðni frá. Onkur er keypt frá gamla skómakaranum í Fuglafirði, sigur hann.

Skómakarin i Fuglafirði var eisini ortopedur, og tað ætlaði Jóhannus sær einaferð at læra.

Hann var óheppin og fekk skaða umborð á trolara einaferð í áttatiárunum, og ætlaði tá at læra til ortopediskan skómakara, sum hann metir, grundarlag skuldi verið fyri.

Men stuðul fekst eingin, tí hildið varð helst, at nokk er við einum umframt teimum, sum boðsendir verða úr Danmark, tá okkurt skal gerast. Ein ortopediskur skómakari er í Føroyum.

## Kunnleikin

Tað stinga av og á hesar sonevndu hælabarrirnar seg upp ymsastaðni. Men tað er ikki altíð, at tað, har verður gjørt, er nóg gott, heldur skósmiðurin.

Ikki tí, bæði fólk og maskinur kunnu vera av fínasta slagi, men ein skal vita, hvat gerast skal, tá farið verður undir eitthvørt. Líka mikið hvat tað nú er. Eisini skósmið.

Bara at fáa nakrar lidnar sollar og hælar at líma undir ein skógv, er ikki altíð nokk, vísir hann á.

– Tað er altíð spennandi at fara undir at gera ein skógv aftur, sigur skósmiðurin. Tí tú veitst ongantíð, um tað fer at bera til. Hann kann bæði seymast og límast. Takast sundur og setast saman aftur. Og tað er sera stuttligt at síggja, hvørja ferð tað eydnast at fáa hann aftur sum nýggjan.

Skósmiðurin heldur tað vera spell, at fakið skal doyggja heilt út í Føroyum, men óttast fyri, at tað verður endin.

– Lærling ber illa til at taka inn, tí tað kann bara gerast, um tað loysir seg, sigur Jóhannus Hansen. Og alt, sum lærast skal av skúla, skal gerast í Danmark.

Tá hann sjálvur lærdi, varð bara farið til arbeiðis, og tá tíðin var úti, varð eitt lærubræv skrivað, og tað var tað. Men teir dugdu handverkið, sigur hann.

Eisini annað enn skógvar hevur skósmiðurin í Miðvági tikið sær av. Hann seymar at kalla alt slíkt, sum ein vanlig seymimaskina ikki klárar.

Setir snarlas í styvlar, leðurjakkar og termodraktir. Seymar smá bátasegl, tá biðið verður um tað, og hvat tað nú kann vera.

– Men tað er bara so langt í millum kundarnar, heldur hann og skeitir yvir á maskinurnar, sum standa á rað so óvirknar og bara bíða eftir at verða settar í gongd.



*Skósmiðurin í Miðvági hevur væl útgjørda smiðju við øllum maskinum, sum skulu til*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Barnið eigur hjartað í henni




*Vit eiga eisini at læra børnini at hjálpa øðrum. Tann sum gevur skal eisini fáa*

**»Gev mær arbeiði til mítt lív er komið at enda – og lív til mítt arbeiði er gjørt«. Orðini eigur frú Baden Powel, men tað er barnavinurin, Sigrun Juul Samuelsen, ið endurgevur setningin og sum roynir at livir eftir honum**

REPORTAGA/ BÝARMYND
*Orð: Steintór Rasmussen*
*Myndir: Jens Kristian Vang/ Steintór Rasmussen*

– Ger so væl og kom innar. Vilt tú hava kaffi? Brúkar tú sukur ella mjólk útí?

Fá tær konfekt afturvið. Tú etur kanska ikki sovorðið?! Tú burdi heldur tosað við mammu! Hon veit so nógv og er hugnalig og áhugaverd at práta við...

Hon ordnar fyri. Spyr og svarar sjálv, og meðan eg heilsi upp á mammuna, Kallu, sum situr í køkinum og leggur kort, er hon eisini har við sínum viðmerkingum. Men tað er ikki mammuna, sum eg var komin at vitja, men stóra barnið í húsinum, sum eitur Sigrun.

Tey mongu familjubíløtuni á veggjunum bera boð um eina barnaríka familju.

Kortini búgva einans Sigrun og mamman í hvítu húsunum á Vágsheygnum í Klaksvík nú.

– Eg havi havt ein góðan og tryggan barndóm. Tá eg var smágenta, vóru vit mangan við foreldrunum úti í náttúruni, har vit lærdu nógv um fuglar og blómur. Eisini at vit skuldu brúka hendurnar. Tá var tað vanligt, at børnini lærdu at binda, seyma, hekla og annað handaligt.

Tað er kanska júst hetta, sum hevur eyðkent lívið hjá Sigrun. Í fólkaskúlanum hevur hon eisini undirvíst í handarbeiði, og í skótaarbeiði hevur hon altíð verið sera kreativ.

Seinastu tveir vetrarnar hevur hon gingið til træsmíð, og við einum stórum brosi á andlitinum sýnir hon fram nøkur prýðilig eggjabikør og ein djúpan tallerk, som hon sjálv hevur gjørt.

## Gøtuseljari

– Vit hava nógv at takka fyri her í Føroyum. Men eg haldi, at vit tora ikki at vísa okkara gleði. Kanska eru vit eitt sindur bangin fyri hvørjum øðrum og at vísa okkara kenslur. Skilur tú hvat eg meini við?!

Og skuldi onkur verið í iva, so er livandi býarmyndin í Klaksvík ikki at taka feil av.

Hon er ikki bangin fyri at heilsa uppá fólk, sum ganga hinumegin vegin. Hon spyr mangan beint frá livrini. Og hon sæst og hoyrist bæði í Sparikassanum og á Posthúsinum. Hon tekur sær ikki tykni av, hvat fólk hugsa og siga. Heldur ikki tá ið hon stendur uttan fyri Keypssamtøkuna og selur – til frama fyri missiónsarbeiði í Afrika – heimagjørt stearinljós við nátúrliting og lukilsi.

– At standa á gøtuni og selja er bæði hugnaligt og stuttligt. Tú kemur í samband við nógv fólk og fært mangt gott prát eisini. Og nú eri eg góðkend sum gøtuseljari bæði av kommununi og politinum. Visti tú tað?

## Børnini í Afrika

Nei, tað mundu tey fæstu vita. Men flestu norðoyingar kenna seg kortini heilt tryggar við, at tað sum Sigrun selur ella savnar inn, man fara til eitthvørt gott endamál. At vera nakað fyri onnur er ein týðandi partur í lívinum hjá barnsligu og spontanu kvinnuni, sum eins væl kundi verið nunna ella sjúkrasystir í Somalia.

– Tað er tann kristna lívsáskoðanum, sum heldur einum í gongd. Eg hugsi, at vit hava ábyrgd yvir fyri menniskjum bæði her heima og úti í tí stóru verðini. Og vit mugu ongantíð halda, at tað ikki ber til at hjálpa. Øll kunnu vit gera okkara besta ella royna at hjálpa eftir førimuni, sigur Sigrun, sum ásannar, at líkasælan millum menniskju er ein stórur trupulleiki í okkara samfelag.

– Tað ringasta av øllum er, um fólk halda, at alt er líkamikið. At lívið hjá øðrum menniskjum ikki viðurkemur okkum. Vit eiga at minnast til, at Guð lønir altíð tí góða við tí góða. Tey, sum geva, skulu ongantíð líða neyð. Tað stendur eisini skrivað í bíbliuni. Vit skulu tí eisini læra børnini, at tað er rætt at geva til onnur. Tann, sum mikið hevur, honum verður eisini nógv kravt av, sigur Sigrun Juul Samuelsen, sum í somu løtu eisini harmast um, at fólk í dag ikki geva sær stundir at hoyra Guðs orð.

Sjálv er Sigrun trúgvur kirkjugangari. Og hóast hon í gerningum fegin roynir at fylgja síni trúgv og tæna kirkjuni, so vil hon ikki, at hetta skal ljóða rættvísgjørd. Heldur hevur hon hug at skáka sær undan, tá ið hon verður spurd, hvør hevur notið gott av hennara orku og vilja at hjálpa.

Hetta at gleða og liva fyri onnur er ein nátúrligur partur av hennara verð. Sjálv hevur Sigrun ongan mann, men børn hava altíð fylt nógv bæði í huga og í gerð.

## Barnavinur

– Eg fór sum ung til Danmarkar. Har tók eg læraraprógv og kom so upp í skótarnar í Roskildi. Tá eg kom heim til Føroya, royndi eg eitt sindur av hvørjum, og miðskeiðis í 60'num var eg á Barnaheiminum í Havn. Mær dámdi sera væl. Ikki minst tí at eg fekk møguleika at vera nakað fyri børnuni har á staðnum. Síðani havi eg verið nógv fólkaskúlalærari og KFUK-skóti í Klaksvík. So eg havi altíð arbeitt nógv við børnum. Tað hevur verið mítt lív. Men eg veit ikki. skalt tú skriva alt?! Fá tær meira kaffi. Vilt tú ikki hava okkurt afturvið!

Eitt er børnini sum Sigrun er komin at kenna gjøgnum sítt yrki og frítíðarvirksemi. Og øll hini sum búgva í menningarlondum í Afrika og aðrastaðni í heiminum, har neyð og krígsstøða er. Men so eru eisini tey, sum fráfarna lærarindan úr Klaksvík kennir persónliga, og sum hon sjálvandi eisini hevur í hjartanum.

– Jú, eg bindi, seymi ella hekli okkurt til børnini, sum eg eri ommusystir og abbasystir at. Men tað er mamma, sum minnist føðingardagarnar. Tað er hon, sum er computarin her í húsinum, grínur Sigrun og vísir fram modellið av eini sjáldsamari húgvu, sum børnini í familjuni fingu á jólum.

– Skal eg siga nakað um mínar eginleikar, so eri góð við børn og havi sera gott tol.

Børnini í dag krevja og fáa næstan alt. Men nøgdsemi er ikki tað sama, sum tá eg var lítil. Kortini haldi eg, at føroysk børn eru fitt og positiv. Tey eru bara meira forkelað…

Ein kann ikki bara fara úr hvítu hugnaligu húsunum á Vágsheygnum uttan at siga mammuni farvæl. Hon fregnast, um vit fingu nakað burtur úr prátinum. Spyr um nakað skil var í. Jú, eg skal ikki klaga. Sigrun er Sigrun. Hennara partur liggur vanliga ikki eftir. Og so var heldur ikki eftir hesaferð.



*Sigrun hevur alment loyvi at selja á gøtuni. Her selur hon heimagjørd ljós og peningurin fer til missónsarbeiði í Afrika*